


# Eingin Evensen eftir í Føroyum uttan í kirkjugarðinum

**Tað er nokk so merkiligt, at eingin við navninum Evensen er í Føroyum. Hetta eru fólk, sum hava spælt ein stóran leiklut í okkara samfelag á ymiskum økjum. Men í gamla kirkjugarði eru tey væl umboðað, og fara vit tí at tríva í teirra søgu**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo



JOEN PETER EVENSEN
F. 6. JULI 1837
D. 11. JULI 1924

AMALIE SOFIE
KRISTIANE EVENSEN
FØDT OLSEN
F. 31. DECEMBER 1833
D. 11. DECEMBER 1903



*Evensenhjúnini saman við børnunum: Ovast f.v.: Jens, Sofus, Sørin, Christian og Johan. Niðast: Margretha, gift við Jens Mohr, og foreldrini Jóan Petur og Amalia Sofía*



*Jóan Petur og beiggi hansara Jens Christian vuksu upp hjá Jens Davidsen*



*Eitt tað kendasta skipið hjá J.P. Evensen, sum hann átti saman við versoninum Jens Mohr, var Lalla Rookh*

Henda søgan byrjar við Ole Even Olsen í Hvalba. Hann varð norðmaður og bleiv tí kallaður Óla Norðmann. Hann var av fyrstu tíð komin úr Noregi at kanna, um tað bar til at bróta kol í Føroyum. Tað kann sigast, at væl kom burtur úr.

Óli giftist við eini føroyskari konu, Elsebeth Joensdatter. Hann segðist at hava verið ein rættuligur kraftkalur.

Sonur teirra Johan Christian Evensen, f. 1804, gjørdist sýslumaður í Suðuroy. Hann giftist bóndadóttrini Elsebeth Susanne Pedersdatter, f. 1832, úr Porkeri. Hon var kend fyri at vera vøkur.

Eisini áttu tey eina dóttir, Marianna f. 1807. Hon giftist við Daniel Jacobsen f. 1806. Tey bæði fingu fýra børn.

Tá ið Johan og Elsebeth høvdu verið gift í nøkur ár fór kikhosti at ganga í 1853. Tað vóru nógv sum doyðu.

Johan Christian Evensen mátti hjálpa læknanum, og tá bleiv hann sjálvur smittaður og doyði tríggjar dagar seinni.

Stutt eftir doyði konan av tuberklum. Eftir sótu trý børn. Tey vóru Elsebeth Christine f. 1831, Joen Peter f. 1837 og Jens Christian f. 1840.

Hesi foreldaleysu børnini máttu tískil fara til onnur at vera. Systirin fór til ein prest, sum hevði kent foreldrini, meðan beiggjarnir komu til Jens Davidsen (1803-1878) í Havn.

Hetta man hava verið tað besta, sum kundi henda dreingjunum. Tá Jens Davidsen eisini er jarðaður í gamla kirkjugarði, skal hann eisini fáa umrøðu í hesi grein.

## Jens Davidsen var ein úrmælingur

Jens var føddur í Suðuroy í 1803. Á heilt ungum árum tók pápi Joen Peter og Jens Christian dreingin til sín og fekk sent hann norður til Havnar at fáa sær skúlaútbúgving. Um hesa tíðina búði Jens C. Svabo í Pæsastovu, og sagt verður frá, at hjá honum lærdi Jens Davidsen bæði at skriva, lesa og rokna.

Bara 14 ára gamal kom Jens á amtskrivstovuna at arbeiða, og í hesum skrivarastarvi sat hann alt sítt lív, og álitismaður var hann við lít. Amtmenn skiftu ferð eftir ferð, men skrivarakallurin var hin sami. Hann dugdi væl at seta nýsettar embætismenn inn í arbeiðið.

Jens Davidsen hjálpti Schrøteri við Mattheustýðingini, og í 1832 skrivar hann til Bíbliufelagið, sum gav Mattheusevangeliið út, og sigur, at hann hevur týtt Markus evangeliið, sum hann býður felagnum til útgávu. Bíbliufelagið sigur seg undan og vísir til, hvussu vánaliga móttøku umseting Schrøters fekk í 1823.

Jens Davidsen kemur harafturímóti at standa sum hin lívgandi andin, sum altíð var til reiðar at veita eina hjálpandi hond, og hann hevur tryggjað sær sess í bókmentasøgu okkara, tí at hann tók stig til at stovnseta Føroya Amts Bókasavn í 1828, har hann eisini var bókavørður í heili 50 ár.

Útlendingar undraðust yvir allan tann kunnleika hann hevði á nógvum økjum. Hann var eisini ofta settur amtmaður, fúti og sorinskrivari. Virðingin fyri honum var stór. Tað varð sagt, at tey ið fylgdu honum til gravar, mundu vera størsti líkskari í Føroyum.

## Komu at seta merki á samfelagið

Hesi trý systkin komu við sínum eftirkomarum at seta merki á føroyska samfelagið.

Systirin Elsebeth Kristine giftist við handilsstjóranum Christoffer Michael Olsen f. 1822. Hann fara vit at umrøða seinni.Tey fingu fimm børn. Ein sonur teirra var Jens Olsen, kendur leiðari av Handilsforeiningini, giftur við Petru Müller. Dótturin Margretha giftist við Søren Emil Müller sum sjálvur við ætt síni hevur havt stóran týdning fyri Føroyar.

Beiggin Jens Christian giftist við Onnu, dóttir Evu og Andreas C. Lützen, fyrsta Lützen í Føroyum. Jens Christian gjørdist prestur og seinni próstur á Viðareiði, í Hvalba, Nesi og í Danmark. Ein sonur teirra var kendi presturin og prósturin A.C. Evensen. Anna fekk beint áðrenn, hon doyði niðurskrivað hennara og teirra søgu, sum í 2003 varð prentað í FF-blaðnum. Hetta var sera áhugaverdur lesnaður. Anna er eisini ein kelda til hesa grein.

Jóan Petur varð sjálvur giftur við Amaliu Sofie Christine f. Olsen. Hon var dóttir skómakaran Søren Olsen, sum var upprunaligi eigarin av Vertshúsinum, sum Hans Andreas Djurhuus seinni gjørdi kent sum Hotel Djurhuus.

Tey fingu tilsamans seks børn. Elst var Maren Margrethe f. 1864, sum giftist við Jens Mohr, sum fyrr er umrøddur í hesi røð. Tey fingu átta børn. Fleiri av teimum vórðu sera kend í Havn, sum Peter Even, Kjartan og Leif.

Søren Christian f. 1866 giftist við Augustu Klein og eigur ókend børn í Amerika.

Jens f. 1868 giftist við Karen Marie Mortensen f. 1879, og tey fingu tvey børn. Tey eru eisini grivin í gamla kirkjugarði og verða lýst í komandi parti

Johan Christian f. 1869 giftist við systkinabarninum Fridu Frederikku f. 1879, dóttir Onnu og Jens Christian Evensen. Hann var kolonibestýrari í Grønlandi, og vit fara í samband við lýsing av føroyingum í Grønlandi í komandi Miðvikum eisini at lýsa nakað av teirra søgu. Tey áttu fýra børn.

Christian Marius f. 1872. Kona hansara æt Mary f. 1879. Tey áttu seks born. Christian gjørdist ein kendur reiðari í Glasgow.

Sofus f. 1877 varð føddur í 1877 og hevur verið umrøddur í hesi røð.

## Reiðari og keypmaður

Jóan Petur fekk handil og gjørdist eitt kent handilsnavn í Havn. Jens Davidsen opnaði í 1860 handilin Jens Davidson & Co. Her fekk Jóan Petur starv. Seinni tók Jóan Petur yvir handilin, og í 1900 tók hann sonin Jens við í fyritøkuna sum samánara, men hin gamli slepti ikki teymunum, sjálvt um hann gjørdist 87 ár.

Í 1902 var nýggjur og rúmligur handilsbygningur bygdur, har Kristnastova og Janstova høvdu staðið. Í 1906 var Evensens brúgv bygd. Har kundu motorbátar og lossijaktir leggja at. Í 1913 varð pakkhús í trimum hæddum laðað upp á økinum aftan fyri brúnna. Fyritøkan hevði eisini tveir motorar Eyvind og Lítla Anna

Í 1918 áttu teir sjey skip og høvdu eisini fiskaturking eins og nógvir reiðarar høvdu.

Í 31 ár var Jóan Petur limur í Thorshavns Borgerræpræsentation og stóran part av tíðini formaður. Hann var eisini nógv ár limur í fátækranevndini hjá kommununi.

**Komandi partur**
verður um Karen og Jens Evensen.